# ALV søkir eftir fólki til træ- og framleiðsluvirki »Verkstaður«

**Vit síggja fegin at tú kanst**
- Framleiga ymiskar lutir úr eitt nú træ
- Og at hava um hendi framleiðsluna, har vit millum annað framleiða ringbind

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum**
- At læra brúkaran eitthvørt handverk sum kann seljast, og vera við til at geva gerandisdegnum innihald
- At menna og upplæra arbeiðstarnað fólk
- At vera við til at byggja upp arbeiði á eindini. Talan kann vera um at arbeiða á øðrum eindum.

**Førleikakrøv**
- viðkomandi útbúgving
- evnir at læra frá sær
- evnir at samstarva, eisini við aðrar fakbólkar
- dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- ert hugskotsfullur, kreativur og positivur.

**Vit bjóða**
- spennandi uppbyggingararbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan

**Løn- og setanartreytir**
- starvið hevur tilvísing til deildarleiðaran
- løn sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið
- starvið verður at seta 1. juni 2003 ella skjótast tilber.

Meira fæst at vita um starvið, við at ringja á tlf. 350070. Spyr eftir Guðrun Guðjónsson, deildarleiðara.

**Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. mai 2003**
Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Smiðjugerð 6, kj
Postboks 301
110 Tórshavn

**brævbjálvin skal viðmerkjast »umsókn verkstaður«**

**»Verkstaður«**
*Endamáli við hesi eindini, er at geva arbeiðstarnaðum fólki, sum ikki hava útlit til at klára seg á vanliga arbeiðsmarknaðinum, men sum hava tørv á at vera dagliga virkin á ein hvønn hátt, møguleika fyri at upplærast til at útinna t.d. lættari handverk.*



**Fiskimálaráðið**
*Skipaeftirlitið*

# Fiskivinnuroyndir 2003 – Lýsing eftir umsóknum, 2. umfar

**Hvat er fiskivinnuroyndir?**
Fiskivinnuroyndir er ein játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar undir gransking og menning innan fiskivinnuna:

Fiskimálaráðið hevur gjørt av, at verkætlanir innan fylgjandi økir hava fyrimun:
- Fiskiskapur við ábyrgd .
- Gagnnýtsla av øllum:
  Sjómatartrygd og nøgdsemi brúkarans
- Virðisøking av upsatilfeinginum
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
- Heilsa, Trygd og Umhvørvi

Somuleiðis er gjørt av, at serligur dentur verður lagdur á nýggjar verkætlanir við atliti at:
- Framleiðslu- og samfelasgbúskap í fiskivinnu á sjógvi og á landi
- Samskipaða skjalfesting av fiskivinnuni t.d. loysnir við »sporføri« og/ella líknandi ávegis tøkniliga samskipan í fiskivinnuni,
- Heilsu, trygd og trivnað í fiskivinnuni

Innan hesi síðstnevndu økir verður tikið ímóti umsóknum, sum kunnu hava eina longd uppá upp til 3 ár. Á hinum økjunum kunnu verkætlanir í høvuðsheitum bert varða árið 2003 út.

**Hvør kann søkja?**
Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða Samskiparanum í Fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi **mánadagin 2. juni 2003.** Sí adressu niðanfyri.

**Meira fæst at vita:**
Skrá, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst frá Vinnuhúsinum. Tilfarið liggur eisini á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo ella Fiskimálaráðnum www.fisk.fo Áhugaði eru eisini vælkomin at venda sær til Ásmund Guðjónsson, samskipara við møguligum spurningum og øðrum.

Ásmundur Guðjónsson, samskipari
Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 17-19
Postboks 347
110 Tórshavn

tel: 353030
fartel. 228001
faks: 353035
t-postur: asmundurg@industry.fo





zarepta

# Lega á Zarepta fyri einlig við ella uttan børn

Um Gud vil verður lega fyri einlig
í døgunum 30. mai – 1. juni 2003.

Henda lega er ætlað yngri einkjum
og einkjumonnum og øðrum einligum
við børnum ella uttan.

Tekning áðrenn 24. mai á tlf. 317698 ella
teldupost: h-krett@post.olivant.fo



veitst tú ikki tað?



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Ruddingardagarnir

Vegna verkfall verða ruddingardagarnir, sum skuldu vera 9. og 10. mai, útsettir.

Lýst verður seinni, nær ruddingardagarnir verða.

SNARSKIVAN



# Sands skúli

Vegna barnburðarfarloyvið verður søkt eftir lærara til Sands skúla 24 t/v frá 1/8-03 til 31/12-03.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastýrinum í hendi seinast 26/5-03

**Skúlastýrið fyri Sands skúla**
Att: Anna Horn
210 Sand